# Tær nýtist ikki at byrja frá grundini

**FØROYA**BANKI

Føroya Banki, Corporate Finance, fær javnan til uppgávu at selja fyritøkur, sum eru verdar millum 1 til 10 mió. kr.. Hetta eru fyritøkur, sum tú kanst keypa, um tú eigur eitt sindur til fíggingina. Tær nýtist ikki at eiga alla keypsupphæddina, tí ein part kanst tú læna.

Hevur hetta tín áhuga, og vilt tú frætta frá okkum, tá fyritøkur eru til sølu, so skráset teg í okkara dátugrunni umvegis heimasíðu bankans www.foroya.fo ella set teg í samband við Corporate Finance deildina á tel. 330 330.

**Føroya Banki**
Corporate Finance
Húsagøta 3
100 Tórshavn
Tlf. 330 330

**www.foroya.fo**





## Føroya Tele søkir eftir fólki til Byggideildina á FT-Net

FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, og fevnir hetta um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. Uppgávan er m.a. at tryggja, at allir veitarar fáa somu atgongd til netið. Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum í FT Net eru at reka og menna netið og selja nettænastur til allar veitarar undir somu treytum.

### Viðlíkahald og rakstur av bygningum hjá samtakinum Føroya Tele

Føroya Tele søkir eftir fólki til Byggideildina hjá FT Net. Talan er um avbjóðandi arbeiðsøki, sum snýr seg um at reka og viðlíkahalda allar bygningar hjá Føroya Tele. Samtakið hevur uml. 120 bygningar, sum eru bæði skrivstovu-/goymslubygningar, tøknihús og telebúðir. Starvsøkið verður um alt landið, tó við høvuðsstøð í nýggja og nútíðar bygninginum, Klingruni í Hoyvík.

Á Byggideildini á FT Net starvast í løtuni 13 starvsfólk, og ábyrgdarøkini eru m.a.:

- rakstur av øllum bygningunum hjá samtakinum Føroya Tele
- el-kervið og neyðstreymmotorar
- køli- og ventilatiónskipanir
- brunatrygd
- umsjón við atgongd til bygningar og útgerð
- reingerð

Rætti viðkomandi er t.d. tekniskur atstøðingur, ella hevur aðra viðkomandi tekniska útbúgving, og kemur m.a. at arbeiða við Autocad. Arbeiðsumhvørvið er skiftandi, og uppgávurnar sera ymiskar.

Løn og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, og starvið verður sett skjótast til ber.

Nærri fæst at vita frá Kára Dal-Christiansen, deildarleiðara, tel 303651 ella frá Starvsfólkadeildini á tel 303030. Vit hoyra fegin aftur frá áhugaðum umsøkjarum.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 28. september 2007 og skulu stílast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

ft•net